












longur. Ein fyrispurningur kemur, um ambulansir eisini skulu sendast inn Leynamegin, men svarið er, at fyrsti læknin Vágamegin er á veg inn í tunnilin, og at bíðast skal við ambulansunum, til hann hevur mett um støðuna.

**Kl. 20.35** kemur fyrsta ambulansan á staðið. Hon kemur úr Vágunum, og brátt kemur ein afturat hagani. Portørarnir fara inn í bussin, har nógvir brandmenn eisini eru. Uttanfyri bussin verða børur settar upp, og nú kemur eisini fyrsti læknin á staðið. Hann rennur yvir til bussin, men av tí, at bussurin er fullur av brandfólki og portørum, má hann bíða eina løtu, áðrenn hann sleppur inn í bussin. At síggja til er alt kaos í løtuni. Nógvar hendur at hjálpa, sum tó ikki heilt vita hvat tær skulu gera... Løgreglan er komin, og nú verða offrini, sum hava gingið og malið, síðan vanlukkan hendi, endiliga savnað og sett inn í ein bil.

**Kl. 20.42** verður fyrsta offrið hjálpt úr bussinum. Unga kvinnan verður løgd á eina børu og førd yvir í ambulansuna. Løtu seinni kemur eisini næsta offrið út úr bussinum. Boð koma nú um, at tyrla er boðsend at hjálpa við sjúkraflutninginum. Tvey illa skadd fólk liggja á børum uttanfyri tunnilsmunnan, har tyrlan fer at lenda, og allatíðina koyra sjúkrabilar til og frá við fleiri sjúklingum. Fleiri læknar eru komin á staðið, og taka hond um tey skaddu.

**Kl. 20.52** lendir tyrlan. Tvey offur verða flutt inn í tyrluna.

**Kl. 20.59** lættir tyrlan aftur. Boð koma um, at sjúkrabilar skulu standa klárir hinumegin sundið, tí tyrlan fer ikki at flúgva heilt til Havnar, men bert flyta tey skaddu tvørtur um Vestmannasund, og tey mugu so flytast á Landssjúkrahúsið við sjúkrabilum.

**Kl. 21.00** koma boð um, at sjey fólk eru eftir inni í bussinum, og harafturat eru nøkur uttanfyri bussin.

**Kl. 21.20** koma so endaligu boðini um, at øll nú eru flutt av staðnum. Talan var um 20 fólk. Harímillum teljast eisini tey, sum ikki yvirlivdu.

# Niðurstøðan: Nøktandi

Málsetningurin fyri P/f Vágatunnilin er, at tá tú koyrir í tunnlinum skalt tú vera eins tryggur, sum tá tú koyrir á vegunum. Tað er orðað á henda hátt: Trygdin móti persónsskaða skal ikki vera verri pr. km av tunnli, enn pr. km av vegi. Tí hevur ein arbeiðsbólkur gjørt eina tilbúgvingarætlan fyri tunnilin. Tað arbeiðið byrjaði í 2001, longu eitt ár áðenn tunnilin lat upp.

Venjingin mikukvøldið var ein týðandi liður í at royna tilbúgvingarætlanina. Og eftirmetingin av venjingini, sum endaliga kemur um nakrar vikur, verður grundarlag fyri møguligum broytingum og dagføringum av ætlanini.

## Professionella hjálp

Venjingin er tilrættisløgd av dønum, ið hava eina sonevnda «Risk Management Group«. Tað var eisini hesin bólkurin, ið er vanur við eftirgjørdar vanlikkur og tilbúgvingarætlanir, ið hevði ábyrgdina av venjingini. Teir vóru somuleiðis eygleiðarar og dómarar, og høvdu til uppgávu at meta um avrikið.

Venjingin var býtt upp í 20 ymiskar partar, harav í minsta lagið 80% skuldu vera væleydnað fyri at venjingin varð góðkend.

Eftirmetingarfundur var á Hotel Hafnia hósmorgunin.

## Ùrslitið

Per Theilgaard, ið var leiðari fyri venjingini, sigur hósmorgunin, at tað sjálvsagt altíð er torført at fáa alt fungera optimalt, tá ein so stór bjarging fer fram.

– Men høvuðsniðurstøðan má vera, at venjingin var útførd nøktandi. Tað fara altíð vera nøkur ting, sum kunnu gerast betri næstu ferð. M.a. hildu vit, at leiðslan og samskiftið ímillum ymisku partarnar kundi verið betri. Men tað er heilt náttúrligt at hetta eru tingini, sum kiksa undir eini venjing, sigur Per Theilgaard.

Hann sigur seg ikki vita júst hvussu nógv % av ymisku pørtunum vórðu útførd væl, men generelli dómurin er, at venjingin var nøktandi.

Um nakrar vikur kemur so endaliga rapportin, ið fer at greina út, júst hvørjir partar áttu at verið betri, hvørjir partar vóru o.k. og hvørjir partar av venjingini vórðu væl loystir.

Men alt í alt kunnu vit trygt koyra ígjøgnum Vágatunnilin.

# Atlantic bjargaði Prix-tøkni

**Føroyska flogfelagið breyt vakt fyri at fáa serliga ljósútgerð til Atlantic Music Event til landið. Teir stóru kassarnir passaðu ikki inn gjøgnum lastahurðina á flogfarinum, og tí vóru serliga stig tikin fyri at loysa trupulleikan**

PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað sigst, at ljósmaðurin Gardar Hall dansaði av gleði, tá ið hann sá teir átta kassarnar við ljósútgerð standa á gólvinum í Norðurlandahúsinum í gjár.

Tað var annars um reppið, at Atlantic Music Event mátti haldast uttan tað serliga ljósið, sum fyrireikararnir høvdu leigað úr Danmark.

Tá ið teir átta kassarnir við útgerðini skuldu lastast í flogfarið hjá Atlantsflogi týsdagin, passaðu kassarnir ikki inn gjøgnum lastahurðina. Kassarnir vóru heilt einfalt ov stórir, og tað var ikki hugsandi at taka viðbreknu útgerðina úr kassunum.

Tí stóðu kassarnir eftir í Kastrup, og fyrireikararnir av AME vóru í ringum lagi, tí leigaða ljósútgerðin hevði stóran týdning fyri tiltakið.

Flugu aftur um náttina.

Nú vóru góð ráð dýr, men føroyska flogfelagið, sum er ein av dyggastu stuðlunum hjá Prix Føroyum, var ikki hjálparleyst.

Mikunáttina varð flogfarið sent aftur til Danmarkar við serligum teknikkarum hjá Atlantsflogi, og teir kláraðu at geva pláss fyri teimum stóru kassunum, fáa teir inn í lastarúmið, og so fleyg føroyska flogfarið heimaftur við ljósútgerðina.

– Vit halda, at hetta er heilt fantastiska flott gjørt av Atlantsflogi. Vit høvdu havt ein stóran trupulleika, um vit ikki fingu útgerðina heim, og tí eru vit sera fegin um hjálpina, sum vit fingu, sigur Fróði Vestergaard, sum er samskipari av Prix Føroyum.